Nr. 73 - 18. apríl 2002 Sosialurin 17

VALGREINAR

# Ungdómurin - skúlaheim og ungdómsíbúðir

**Jóhan M. Stenberg**
*valevni sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymi*



Størsti parturin av valagninum hjá flokkunum er pensjónin, men í Føroyum eru onnur enn pensjónistar. Okkara mergjaði ungdómur, ið skal bera landið víðari, skal hava betri umstøður at liva undir.

Tey ungu, ið eru farin undir lesnað her heima, hava í farna valskeiði fingið ein munandi betri lestrarstuðul, men er hetta einsamalt ikki nokk. Ikki øll ung eru so heppin, at tey kunnu búgva heima hjá foreldrunum, meðan tey lesa, og eru tey tí noydd til at leiga sær kamar ella íbúð at búgva í. Prísirnir her í Suðurstreymi eru alt ov høgir, og ger tað, at allur lestrarstuðulin fer til leigu. Sjálvstýrisflokkurin vil arbeiða fyri, at skúlaheim verða gjørd, so tey lesandi kunnu leiga sær eitt stað at búgva í, ið ikki skal kosta teimum allan lestrarstuðulin. Tey skulu hava pengar eftir, so tey hava okkurt at liva av.

Ikki einans teir lesandi ungdómarnir hava brúk fyri einum búðstaði, men eisini tann arbeiðandi ungdómurin. Tí eiga ungdómsíbúðir eisini at verða gjørdar.

Hugsið um ungdómin. Setið X við lista D.

# Ungdómurin eigur framtíðina

**Sunleiv Højgaard,**
*valevni fyri javnaðarflokkin í Eysturoy*



Ein greiður ungdómspolitikkur er minsta kravið.

Eingin ivi er um, at tað verður ungdómurin, sum eigur framtíðina, og tað verður hann, sum skal bera hetta samfelagið víðari.

Hesi seinastu árini, har búskapurin hevur verið í fagrasta blóma, hevur lítið verið at hoyrt til ungdómspolitikk.

Tað er neyðugt at taka spurningin í álvara, og skapa karmar. Karmar, ið geva ungdóminum møguleika at virka, tað verður seg ítróttarliga og mentunarliga. Sum er, verður stórur partur av ungdóminum drigin av møguleikum, høvuðsstaðurin býður. Her verður neyðugt hjá polittikkarum, ið valdir verða í Eysturoynni, at leggja oyra til tað, ungdómurin hevur at siga, og virka fyri einum ungdómspolitikki, sum røkkur út um høvuðsstaðin.

Útbúgving er eyðkennið fyri framtíðarsamfelag, og lykilin til møguleikar, og tí verður neyðugt við fjølbroyttum útbúgvingarmøguleikum til øll.

Javnaðarpolitikkur leggur dent á, at øll fáa møguleikan. Møguleika til framtíðina, óskerd av persónligu umstøðunum annars.

"Er møguleikin til øll" tín áskoðan, er valið av einum umboði á javnaðarlistanum besta trygd fyri tínum framtíðarmøguleikum.

# Tað gongur ótrúliga væl í Føroyum!!

**Eyðun Jacobsen**
*Valevni Miðfloksins í Eysturoy*



Hesi orð eru søgd av mongum politikara.

Ì dag sita eldri menniskju og bíða eftir einum plássi á einum røktarheimi, onkur av teimum kemur ongantíð nóg langt fram í køina og legst í mold, áðrenn pláss er tøkt. Vit senda bara 366 milliardir kr. aftur til Danmarkar, tað gongur jú allíkavæl so ótrúðliga væl í Føroyum.

Bíðilistarnir til ymiskar skurviðgerðir blíva bara alsamt longri, so....... hví ikki bara senda 366 milliardir kr. aftur til Danmarkar, tað gongur jú allíkavæl so ótrúðliga gott í Føroyum.

Ørkymlað foreldur standa spyrjandi við teirra børnum, einki ansingarpláss er at finna, hvat skulu tey gera. Vit senda bara 366 milliardir kr. aftur til Danmarkar, tað gongur jú allíkavæl so ótrúðliga væl í Føroyum.

Landssjúkrahúsið er við at fara í hundarnar og hevur brúk fyri eini fíggjarligari innspræning........... Vit senda bara 366 milliardir kr. aftur til Danmarkar, tað gongur jú allíkavæl so ótrúðliga væl í Føroyum.

Ca. 50 føroyingar fingu ongantíð loyvi at síggja dagsins ljós í 2001, tað sum skuldi verða tað tryggasta staði fyri eitt fostur, í móðurlívi, er blivið tað ótryggasta.......... hetta hava politikarar ikki tíð at hugsa um.....tað er annað at hugsa um.....fullveldið..........nei... ..samband.......... Vit senda bara 366 milliardir kr. aftur til Danmarkar, tað gongur jú allíkavæl so ótrúðliga væl í Føroyum.

Føroyski borgarin hevur eitt sera stórt pláss í einum politikarahjartað serliga hjá fráfarandi samgongu, ja so stórt at teir bara fara niður í lummarnar hjá teimum og í einum uttan at spyrja taka teir bara 366 milliardir kr. og forera tær til tann Danska borgaran, tað gongur jú allíkavæl so ótrúðliga væl í Føroyum.

Góði veljari, hugsa teg nú væl um áðrenn tú setur krossin, men eitt er sikkurt, ein krossur við Miðflokkin er ein krossur fyri einum øðrvísi og tryggari samfelagi, grundað á eitt trygt fundament, Guds æviga orð.

# Hví vilja danir ikki?

**Niels Th. Pedersen**
*Valevni fyri Fólkaflokkin í Norðurstreymi*



Er tað móðurkærleikin til ta føroysku tjóðina, sum ger, at danir tvíhalda so fast um teirra vald og rættindi í Føroyum?

Ella kundi tað hugsast, at Føroyar eru eitt so gott aktiv, so mikið gott, at danir undir ongum umstøðum vilja missa valdið á okkum? Tað er jú ein vánaligur handilsmaður, sum lættliga letur eitt gott og inntøkugevandi aktiv av hondum.

Hin triði møguleikin er so hann, at tað bert er stoltleiki forsætisráðharrans, sum forðar fyri, at Føroyar verða frælst land og føroyingar fræls tjóð, tí so minkar hansara ríki só ríviliga.

Um nú onkur av hesum møguleikum er sannur, sama ger hvør, so eru teir allir moralskt og løgfrøðiliga skeivir.

Ein virðilig tjóð og ríkisleiðari, sum stríðast á øðrum landaøkjum við at vinna øðrum londum teirra frælsi, kann ikki moralskt tvíhalda so fæst um landnámið Føroyar.

Tað mest umráðandi er tó, at føroyingar sjálvir vilja. Vilja loysa seg frá móðurbindingini, vilja taka ábyrgd sjálvir, og vilja kenna stoltleika av at vera frælsir.

Við Fólkaflokkskvøðu.

# Føroyar klára seg uttan Danmark men ikki uttan Guð

**Steindor Hjaltalin**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymi*

Miðflokkurin hevur sín politikk grundaðan á Guðs orð, tí vit vita, at um vit biðja til Guð, halda okkum til hansara og gera hansara vilja, so verður hann við okkum og syrgir fyri, at vit hava tað, ið okkum tørvar.

Frá Guði hava vit fingið eitt stórt havríkidømi. Tað eiga vit at umsita á ein skilagóðan hátt, so tað verður til gagns fyri alt fólkið. Í kreppuárunum bleiv fiskurin nærum uppi, men tíbetur áttu vit biðjandi fólk kring landið, fólk, ið bóðu Guð um at lata æti koma inn á grunnarnar, so teir aftur kundu fyllast við fiski og Guð hoyrdi bønirnar. Hann fylti ríkiliga í aftur og bjargaði okkum burturúr kreppuni.

Seta vit okkara álit á Danmark, er framtíð okkara ikki trygg. Tí í Danmark galda lógir, ið beinleiðis eru í stríð við Guðs orð, her eru nøkur dømi:

**Tú kanst drepa ófødd børn um tú vil (frí fosturtøka)**
Tvey fólk av sama kyni kunnu giftast, ja eisini prestar kunnu gifta tey

Prestum er loyvt at virka sum prestar, eisini um teir eru samkyndir

**Frítt porno**
**Skøkjulevnaður**

Eg vil minna á, at júst orsakað av nøkrum av omanfyri nevndu dømum blivu Sodoma og Gomorra lagdar í oyði. Eiga vit at líta á eitt land, hvørs framtíð vit ikki kenna? Vit eiga at biðja fyri Danmark, men álit okkara má ikki vera á eitt land, men á Guð og hansara fyrijáttan, so skal hann signa okkum, so vit klára okkum undir øllum umstøðum.

# Fólk við skerdum førleika hava ikki virðulig rættindi

**Jastrid Nielsen**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum í Suðuroy*

Virðuligar umstøður til fólk við skerðum møguleikum.

Fer eftir fer lesa vit í bløðunum at fólk, sum av einari ella aðari orsøk hava mist sín førleika, tað kann verða av millum øðrum sjúku ella vanlukku, skulu nýta tað síðstu orkuna hjá sær og sínum nærmastu til at fáa ein lítlan part av sínum sjálvsøgdu krøvum gjøgnumførd, tað kann verða eitt so sjálvsagt ting sum at kunna verða búgvandi í egnum húsum.

Ìstaðin fyri áttu tey at nýtt orkuna uppá at komið seg eftir tilburðin og at vant seg við tað nýggju støðuna. Hugsast má um at bæði viðkomandi og familjan eru í einari sálaligari kreppu.

Sum eitt vælferðarsamfelag við høgt útbúðnum starvsfólkum, mugu vit tryggja hesum fólkum eina skjótari virðuligari tænastu, sum tey hava brúk fyri og tá tey hava brúk fyri henni.

FÓTBÓLTSBLAÐIÐ 2002




Fæst kring alt landið frá fríggjadegnum 19. apríl

Sosialurin

SERTILBOÐ Sky digital og Orbit Network.

Kort og móttakari, alt fæst nú á einum stað.

Kortsáttmála beinleiðis við Sky Digital.

Sjálvandi tann tryggasta loysnin. Hví noyðast við nakrar fáar rásir tá tú kanst síggja tær flestu.
Tað eru umleið 200 rásir at velja ímillum

Nøkur dømi:

UK GOLD, UK GOLD 2, one, SKY SPORTS, SKY SPORTS 3, SKY SPORTS EXTRA, SKY SPORTS 2, SKY SPORTS 1, Discovery, Cartoon Network, BBC KNOWLEDGE, BBC PARLIAMENT, BBC NEWS 24, BBC ONE, BBC TWO, MTV

Inter Sky Line



Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tlf. 421411 ella 215328

4.995,-

uml. 3 vikur bíðitíð